# Trý stig fremstur

## Talvið hesa vikuna

**Kasparov,G (2849) - Grischuk,A (2663)**
**SuperGM Linares ESP (10), 06.03.2001**

1.e4 c5 (Sicilianskt hevur verið nógv spælt í Linares) 2.Nf3 Nc6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 e6 6.Nxc6 (6.Ndb5 Bb4 verður eisini nógv spælt nú á døgum) 6...bxc6 7.e5 Nd5 8.Ne4 Bb7 9.Be2 c5 10.0-0 Qc7 11.Nd6+ (Kasparov-Leko 1999 remis) 11...Bxd6 12.exd6 (finnan kann ikki takast vegna c4, og hvítur vinnur) 12...Qc6 13.f3 c4 14.Qd4 0-0 15.Bxc4 Rfc8 (teoretisk nýggjheit. Grischuk vil út í endatalv við finnu minni, men remiskjansir vegna ólíkafarvaðar bispar. Vanligt er at taka á d6) 16.Bxd5 Qxd5 17.Qxd5 Bxd5 18.Rf2 Rc6 19.Bf4 Rac8 20.Rc1! (c3? a5! og hvítur kann ikki vinna, Kasparov má tí fáa b3, c4 framt) 20...Ra6 21.a3 f6 22.Be3 Ra4 (22...Rxd6 23.Bxa7) 23.Ra1! e5 24.b3 Ra6 25.c4 (nú er restin teknikkur, og tað er Kasparov maður fyri. Nýggjheitin hjá Grischuk, 15. Rfd8 var heldur ivasom) 25...Be6 26.Rd2 Rb8! (Grischuk roynir at halda trýstið á hvítu finnurnar) 27.Rd3 Rb7 28.g4 h5 29.h3 hxg4 30.hxg4 f5? 31.Bc5 Rc6 32.b4 fxg4 33.fxg4 Rc8 34.Re1 Bxc4 35.Rc3 Bb5? (35...Be6 betri) 36.Rxe5 Rf8 37.Bxa7 Bc6 38.Be3 Rbb8 39.Bg5 Rb5 40.Rcc5 Rb6



41.b5 Bf3 42.Be7 Ra8 43.Rg5 Rxa3 44.Bf6 Kf7 45.Bb2 Grischuk gavst. 1-0

*Fyrrverandi heimsmeistarin, Karpov, kann vera væl nøgdur um avrikið hjá sær í kappingini*




**Klassamunur varð í Linares har Gary Kasparov endaði heili trý stig framanfyri allar hinar fimm stórmeistarnar, sum endaðu javnir á øðrum plássi.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Heimsins sterkasti telvari í løtuni er Kasparov. Ikki kann hann longur kallast heimsmeistari, men tað forðar honum ikki at vinna allar tær sterkastu kappingarnar í heiminum. Í 1999, 2000 og 2001 hevur hann hvørt árið vunnið báðar krútkappingarnar Wijk aan Zee og Linares, og oftani sannførandi eisini.

Linares, sum liggur í Spania og er eisini har Shirov í hesum døgum býr, er býur sum hevur lagt navn til siðvandu talvkappingina. Kappingin í ár varð merkt av at heimsmeistarnir Vladimir Kramnik og Viswanathan Anand ikki luttóku, men ístaðin var gamla kjempan Anatoly Karpov og unga stjørnuskotið og vinnarin av 3rd Tórshavn International Alexander Grischuk bjóðaðir við. Hini vóru Alexei Shirov, Peter Leko og Judit Polgar. Dupultumfar bleiv telvað.

### Eingin kjansur

Eftir fyrstu trý umførini var einki sum bendi á at Kasparov skuldi enda langt ovastur, øll høvdu nevnliga hálvtannað stig. Men eftir hesa varliga byrjan vann kasparov síðani fimm talv og leikti tvey jøvn og fekk tí heili 7,5 stig av tíggju møguligum. Eftir áttanda umfar hevði hann longu tryggjað sær deilt fyrsta pláss, tá hann var tvey stig framanfyri Polgar.

Shirov og Leko skuffaðu við bert hálvumfimta stigi, meðan Polgar, Karpov og serliga Grischuk høvdu góða kapping við eins nógvum stigum.

Merkisvert er at bert Kasparov fekk yvir 50 % skoru. Hann vann fimm talv, meðan hini bert vunnu seks talv tilsamans.

Undan seinasta umfari lá Shirov aftastur, men vann síðsta talvið ímóti Polgar. Peter Leko leikti níggju javnleikir og tapti eitt, hetta ímóti Kasparov, og blívur hann eisini í hesum døgum nógv kritiseraður fyri sín spælistíl, sum viðførir allir hansara javnleikir.

Judit Polgar var einasti telvarin sum ikki tapti ímóti Kasparov, men leikti tveir javnleikir. Hon lá leingi einsamøll á øðrum plássi, men helst var orkan uppi ímóti endanum. Eitt nú tapti hon eftir sjey tímar ímóti Karpov í áttanda umfari.

Karpov kann vera væl nøgdur við sítt úrslit. Serliga talvið ímóti Polgar varð vælleikt, og eisini javnleikurin við svørtum ímóti Leko, har hann vísti verjuspæl í heimsklassa. Grischuk hevði sera góða seinnu helvt, eitt nú vann hann á Shirov og Karpov. Hann kann vinna á nærum øllum við hvíta fólkinum, men við svørtum er hann enn ov veikur tá talan er um heimselituna. Shirov hevur júst sama trupulleika.

### Endaliga støðan:

| | |
|---|---|
| G. Kasparov | 7,5 /10 |
| J. Polgar | 4,5 |
| A. Karpov | 4,5 |
| P. Leko | 4,5 |
| A. Shirov | 4,5 |
| A. Grischuk | 4,5 |

Úrslitið prógvar tað at bert Kramnik og Anand kunnu kappast við Kasparov, sjálvt Shirov og Leko eru ein klassi undir krútsterka tríbólkinum.

Kyndil–H71 31–25 (12–15)

# Kyndil vaknaði í seinna

**Eftir ein lakan fyrra hálvleik tóku kyndilsmenn sær um reiggj seinasta hálva tíman móti H71**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki væntandi, at hoyvíkingar skuldu gera nakað við Kyndil, men tað var júst tað, sum teir kortini gjørdu fyrra hálva tíman av dystinum mikukvøldið.

Hesa løtuna var tað nevnliga H71, sum var frammanfyri, og var tað ikki fyri ein væl leikandi Høgna Klein, so kundi munurin verið væl størri millum liðini.

### Vendi í seinna

Efitr steðgin kom tó rættiliga vend í, og eftir fáum minuttum hevði Kyndil strítt seg upp á javnt. Rættiligt lpp kom í um miðjan hálvleikin, tá Kyndil fekk sjey mál á rað, og so var alt í roynd og veru avgjørt.

Við sigrinum styrkti Kyndil munandi um møguleikarnar at vinna silvurmerkini, og ikki minst mundi tað fyri teir vera ein kærkomin gáva, at kollfirðingar bastu strandingum inni á Skála.

H71 misti hinvegin aftur tvey stig, men í botninum broytti hetta einki, tá Tjaldur samstundis taptu í Vestmanna.



*Tá kyndilsmenn í seinna hálvleiki fingu tak á H71, skutu teir brádliga sjey mál á rað, og so var sigurin at kalla tryggjaður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Høgni Klein 9, Bjarni Wardum 6, Uni Wardum 5(3), Hans Áki Dal Christiansen 4, Jónleif Sólsker 3, Heini Bendtsen 3, Hanus Jensen 1
H71: Halgir Dahl Olesen 9(3), Agnar Højgaard 5, Rene Dahl Olesen 4, Anfinn N. Debes 3, Høgni Hansen 2, Johnny Durhuus 1, Olaf Vestergaard 1
Brotskøst: Kyndil 4, H71 5
Útvísingar: Kyndil 3, H71 5
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

VÍF-Tjaldur 27-15 (15-8)

# Eingin ivi

**VÍF kvinnurnar vunnu aftur mikukvøldið, tá Tjaldur var á vitjan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mest einaráðandi hondbóltsliðið í ár er helst kvinnuliðið hjá VÍF, sum longu hevur tryggjað sær steypakappingina, umframt at gullið í landskappingini nærkast við fullari ferð.

Mikukvøldið leiktu tær móti Tjaldri, og ikki óvæntað vunnu teir á heimaliðnum tryggan sigur. Longu fyrstu løtuna varð allur ivi beindur til viks, og støðan eftir 20 minuttum var 12-3.

Eftir hetta tók heimaliðið sær meira av løttum, soleiðis at Tjaldur kundi pyntað eitt sindur um úrslitið, men í vanda kom sigurin so ongan tíð.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Nikolina Eyðbjørnsdóttir 8, Ioana Rápa 8(2), Fríða Marjunardóttir 4, Jacklin Durhuus 4, Sóley Mikkelsen 2, Angelie Jógvansdóttir
Tjaldur: Beinta Joensen 4(1) Milica Ergic 3(1), Mona Langgaard 3(1), Oddvá Fossdalsá 2, Kristina Ellingsgaard 2, Jelena Jevtic 1
Brotskøst: VÍF 4, Tjaldur 5
Útvísingar: VÍF 5, Tjaldur 2
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen.




# Stjóri
## til Matrikulstovuna

Við hesum verður søkt eftir stjóra til Matrikulstovuna.

Matrikulstovan
Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálastýrinum.

Matrikulstovan skal, sambært lóg, hava fullfíggjaða skráseting av øllum føstum ognum í Føroyum - matrikulin, og vera før fyri at seta mark millum fastar ognir út frá skrásettum mørkum, matrikulkortum og málibløðum. Grundarlagið undir hesum er fikspunktnetið, sum stovnurin umsitur og røkir.

Matrikulstovan umsitur eisini altjóða netini í samstarvi við KMS (Kort- og Matrikelstyrelsen). Harumframt skal Matrikulstovan, sambært lóg, útinna tað arbeiði, henni verður álagt av útskiftingini í sambandi við broytingar til bata fyri jarðarbrúkið.

Starvið
Stjórin hevur ábyrgdina av at leiða, reka og menna stovnin, og skal fremja tær uppgávur og ætlanir, sum eru lagdar til Matrikulstovuna.

Førleiki
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:
· Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú landinspektør, útskiftingarkandidatur, løgfrøðingur, verkfrøðingur ella tilíka útbúgving
· Leiðsluroyndir frá almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum
· Góð samstarvsevni og mennandi leiðslustíl

Førleikakrøv
Vit vænta okkum, at umsøkjararnir m.a. hava:
· Hægri útbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði, umsiting e.l.
· Royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting
· Góð samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl

Setanarviðurskifti
Talan er um tænastumannastarv 37. lønarflokki. Starvsheiti er stjóri, og tænastustaðurin er fyribils Matrikulstovan. Setanarøkið er Vinnumálastýrið og stovnar undir tí.

Umsókn
Umsókn við prógvum, starvsroyndum o.ø. verður send til:

Vinnumálastýrið
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal verða Vinnumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 26. mars 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, aðalstjóra í Vinnumálastýrinum, tel 35 60 60.

V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð

# Netumsitari

Netumsitarin hjá okkum fór í annað starv 1. januar 2001. Vit søkja tí eftir nýggjum netumsitara til NETumsitingina á Debesartrøð, sum hevur ábyrgd av eini fjølbroyttari netskipan, sum bindur saman 7 stovnar í 14 bygningum við tilsamans umleið 150 brúkarum.

**Netumsitarin skal:**
- hava umsjón við ryggnetinum (backbone) við tilhoyrandi netsamskiftisútgerð
- samskifta og samstarva við netábyrgdararnar á teimum 7 stovnunum
- umsita web-, ftp-, navna- og postambætararnar
- samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- svara fyrispurningum og leggja skeiðvirksemi til rættis
- samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini
- verða skrivari hjá netráðnum

**Vit ynskja:**
Umsøkjarar við hollari tekniskari útbúgving og kunnleika í teldutøkni, stýrisskipanum, teldunetum og teldusamskifti, hava fyrimun. Góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt eru ein treyt.

**Vit bjóða:**
Eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv hjá NETumsitingini. Góðar eftirbúgvingarmøguleikar.

Setan skjótast til ber. Løn sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og avvarandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Anniku Sølvará, tlf. 315302, teldupostur annikas@setur.fo

Umsóknarfreistin er 23.3.2001. Umsóknir við ævilýsing (CV), avriti av próvskjølum og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til

**Netráðið**
**Att. John Kjær, formaður**
**Setursskrivstovan**
**J.C. Svabos gøta 14**
**100 Tórshavn**

NETumsitingin er tænastustovnur, ið vegna netsamstarvið:
- hevur umsjón við, heldur við líka og samskipar útbyggingar av ryggnetinum (backbone) á Debesartrøð og tilknýtið til internetið, sum granskingar-, mentanar- og útbúgvingarstovnarnir nýta
- savnar vitan og fylgir við menningini innan netsamskifti, teld og teldnýtslu yvirhøvur
- veitir samstarvsstovnunum ráðgeving og hjálp í netsamskiftis- og telduspurningum
- skipar fyri møguligum felagskeypi av rit- og tólbúnaði, skipar fyri skeiðum, kunningarfundum og tilíkum.

Netumsitarin arbeiðir í tøttum samstarvi við netábyrgdararnar á hesum stovnunum, sum tilsamans mynda netsamstarvið: Fiskirannsóknarstovan, Fornminnissavnið, Fróðskaparsetrið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið og Náttúrugripasavnið.

# Bókhaldari

Søkt verður eftir royndum bókhaldara hálva tíð til arbeiðsuppgávur í Havn. Møguliga verður talan um fulltíðarstarv seinni.

Kunnleiki til Concorde C5 og Navigator er ein treyt.

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn verður at senda innan 17. mars 2001.

Føroyabók
*Skrásett grannskoðaravirki*

**Vágstún 2**
**FO-700 Klaksvík**
**Tlf. 455522 og 217505**

# Avloysarastarv

Vegna farloyvið verður lýst eftir vaskaríleiðara. Starvið er tíðaravmarkað frá 1.7.2001 til 15.7.2002. Starvið er lønt sambært sáttmála Starvsmannafelagsins.

Skrivlig umsókn við frásøgn um arbeiðsroyndir v.m. verður at senda áðrenn tann 1. mai 2001 til:

Formannin fyri Stýrið
Ellis-& Avlamisheimið í Vágum
370 Miðvágur

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á heiminum.



**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**

# Longur opið á
## Kommunalu Brennistøðini

Endamálið við at hava opið longur, er at lættari skal verða at sleppa av við burturkast.

Jarn frá vinnuvirkjum og bilvrak verður ikki móttikið leygardag.

**Opið er hvønn leygardag frá kl. 13.00-17.00.**

Umframt er opið:
mánadag, mikudag og fríggjadag: **kl. 08.00-17.00**
týsdag og hósdag: **kl. 08.00-20.00**

Tórshavnar kommuna

Kommunala Brennistøðin